# Skráseting av eigarum og veruligum eigarum

***Skráseting av eigarum og veruligum eigarum var sett í verk 1. februar 2022. Hetta er ein lýsing av hugtøkunum eigari og veruligur eigari. Eisini verður lýst hvat eitt virki skal skráseta og senda Skráseting Føroya. Ein frymil til hetta er við í hesum skjali.***

## Endamálið við skrásetingini

Endamálið við at skráseta eigarar og veruligar eigarar er, at forða fyri hvítvasking, skattaundandrátti og fígging av yvirgangi.
Fyri at røkka hesum endamálum, er lóggáva sett í gildi við kravi um, at upplýsingar um eigarar og veruligar eigarar skal fráboðast Skráseting Føroya.
Tað er felagið, sum hevur veruligar eigarar, sum hevur skyldu at fráboða hetta.

## Hvat er ein (løgligur) eigari

Ein persónur ella eitt felag, sum eigur ein part av einum felag, er ein eigari. Krav er um, at allir eigarar sum eiga 5% ella meira skulu fráboðast til Skráseting Føroya.
Tað er felagið, sum hevur ábyrgdina av at finna útav hvørji eru eigarar av felagnum og fráboða hetta til Skráseting Føroya.
Um tað broytist, hvør er eigari, so hevur felagið skyldu at fráboða tað til Skráseting Føroya skjótast gjørligt.

## Hvat er ein veruligur eigari

Ein veruligur eigari er ein livandi persónur, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eigur, hevur ræði ella fær ágóða frá einum felag.
Ein livandi persónur kann tí metast sum veruligur eigari av ymiskum ávum. Herundir:

- Eigur beinleiðis ella óbeinleiðis meira enn 25 % í einum felag.
- Hevur avtalu um at hava atkvøðurætt, uppá meira enn 25%.
- Hevur umvegis onnur feløg ræði á atkvøðurætti, uppá meira enn 25%.
- Hevur beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á felagnum.

Ræði á einum felag kann eisini vera umvegis aðrar avtalur, og kann hetta viðføra at ein persónur verður at meta sum veruligur eigari.
Tað kann verða torført at meta um, í hvørjum føri ræði ella ágóði viðførir at ein persónur er at meta sum veruligur eigari. Um ivi er, so skal persónurin skrásetast sum veruligur eigari.
Tað er felagið, sum hevur ábyrgdina av at finna útav hvørji eru veruligir eigarar av felagnum og fráboða hetta til Skráseting Føroya.
Um tað broytist, hvør er veruligur eigari, so hevur felagið skyldu at fráboða tað til Skráseting Føroya.

# Hvør skal skráseta hvat

Tað er ábyrgdin hjá einum felag, at skráseta sínar eigarar og veruligi eigarar hjá Skráseting Føroya.
Um eigarar ella veruligir eigarar broytast, er tað somuleiðis ábyrgdin hjá felagnum at boða Skráseting Føroya frá á skr@vs.fo.
Skrásetingin fer fram á tann hátt, at felagið fyllur út eitt fráboðanarskjal og sendir tað til Skráseting Føroya í PDF formati.
Í skjalinum skulu vera upplýsingar um eigarar og veruligir eigarar.
Í samband við veruligar eigarar, skulu allar upplýsingar og øll feløgini upplýsast, sum eru viðvirkandi til, at persónurin verður mettur at vera veruligur eigari hjá felagnum, sum skrásetur.
Eitt einfalt dømi er eitt felag, har bara beinleiðis eigarar og veruligir eigarar eru at upplýsa. Tað verður meira fløkt, um persónurin er veruligur eigari umvegis onnur feløg og viðurskifti. Tað kann enntá verða útlendsk feløg og persónar sum skulu fráboðast.
Tá hesar upplýsingar innihalda upplýsingar, um eigaraskap hjá øðrum feløgum enn fráboðandi felagnum, verða hesar skrásettar. Tó skal minnast til, at tað ikki frítekur hesi feløgini frá skylduni at fráboða eigarar og veruligar eigarar.
Hetta merkir, at upplýsingar kunnu koma inn fleiri ferðir fyri sama felag, frá ymiskum keldum. Skráseting Føroya vil so tryggja, at upplýsingarnar verða rætt skrásettar.
Hjálagt hetta skjalið, eru fráboðanarskjøl, at nýta til fráboðan av eigarum, veruligum eigarum og øðrum viðurskiftum av týdning fyri at staðfesta veruligar eigarar.
Onnur skjøl kunnu eisini nýtast, um somu upplýsingar eru við.

Skráseting Føroya

# Fráboðanarskjal, at nýta til eigarar og veruligar eigarar – Einfalt

Hetta skjalið kann nýtast til at fráboða eigarar og veruligar eigarar, har bert beinleiðis eigarar og veruligir eigarar skulu fráboðast.

Her er tað Sp/f Royndarfelagið við skrásetingar nr. 7777, sum boðar frá at persónurin Hans Hansen eigur 100 % og harvið er veruligur eigari í Sp/f Royndarfelagnum.
‘X’ skal setast í ‘Veruligur’ um talan er um meira enn 25 prosent eigaraskap.
Tað er “Sára Hansen” frá “Grannskoðaravirkinum” sum vegna Sp/f Royndarfelagið hevur latið fráboðanina inn, og váttar at hon er í lagi.



## Einfalt fráboðanarblað

Skráseting Føroya

Fráboðandi felag (Navn + Bústaður)

Sp/f Royndarfelagið
Skálatrøð 20
FO-100 Tórshavn

Skrásetingar nummar: 7777

| Navn á eigara | Bústaður | P-tal | % | Veruligur eigari |
|---|---|---|---|---|
| Hans Hansen | Undir Brúnni 1, 100 Tórshavn | 010150-000 | 100.00 | ✔ |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

Ongin veruligur eigari: ☐

Grannskoðaravirkið, Sára Hansen — Fráboðari

21/09/2022 — Dagfesting

Sigmundargøta 13, Postrúm 264, FO-110 Tórshavn, Tlf: +298 35 60 10, skr@vs.fo

Skráseting Føroya

# Fráboðanarskjal, at nýta til eigarar og veruligar eigarar – nágreiniligt

Hetta skjalið kann nýtast til at fráboða eigarar og veruligar eigarar, har tað ikki er ein einføld fráboðan. T.d. har sum persónar eru veruligir eigarar umvegis eitt ella fleiri føroysk ella útlendsk feløg.

## Fráboðanarskjal,
### at nýta til eigarar og veruligar eigarar – nágreiniligt

Skráseting Føroya

Fráboðandi felag (Navn + bústaður)

Sp/f Royndarfelagið
Skálatrøð 20
FO-100 Tórshavn

Skrásetingar nummar: 7777

| Veruligur eigari í Fráboðandi felag | Felag ella persónur, sum eigur part av felagnum | Eigur % | Felag, sum eigari eigur í |
|---|---|---|---|
| ☐ | Navn Big Capital Denmark A/S<br>Adr. Selskabsvejen 99, 7500 Herning<br>P-tal/skrás. nr. CVR 01234567 | 52,00 % | Navn Sp/f Royndarfelagið<br>Adr. Skálatrøð 20, 100 Tórshavn<br>Skrásetingar nr. 7777 |
| ✔ | Navn Anders And<br>Adr. Gadekæret 27, 1000 Ikast<br>P-tal/skrás. nr. 020282-001 | 50,00 % | Navn Big Capital Denmark A/S<br>Adr. Selskabsvejen 99, 7500 Herning<br>Skrásetingar nr. CVR 01234567 |
| ✔ | Navn Peder Pedersen<br>Adr. Rådhuspladsen 145, 1550 København<br>P-tal/skrás. nr. 030373-0303 | 50,00 % | Navn Big Capital Denmark A/S<br>Adr. Selskabsvejen 99, 7500 Herning<br>Skrásetingar nr. CVR 01234567 |
| ☐ | Navn Sp/f Felagið<br>Adr. Sigmundargøta 13, 100 Tórshavn<br>P-tal/skrás. nr. 0101 | 30,00 % | Navn Sp/f Royndarfelagið<br>Adr. Skálatrøð 20, 100 Tórshavn<br>Skrásetingar nr. 7777 |
| ✔ | Navn Hans Hansen<br>Adr. Undir Brúnni 1, 100 Tórshavn<br>P-tal/skrás. nr. 010150-000 | 90,00 % | Navn Sp/f Felagið<br>Adr. Sigmundargøta 13, 100 Tórshavn<br>Skrásetingar nr. 0101 |
| ☐ | Navn Sára Hansen<br>Adr. Undir Brúnni 1, 100 Tórshavn<br>P-tal/skrás. nr. 040494-044 | 18,00 % | Navn Sp/f Royndarfelagið<br>Adr. Skálatrøð 20, 100 Tórshavn<br>Skrásetingar nr. 7777 |
| ☐ | Navn<br>Adr.<br>P-tal/skrás. nr. | % | Navn<br>Adr.<br>Skrásetingar nr. |
| ☐ | Navn<br>Adr.<br>P-tal/skrás. nr. | % | Navn<br>Adr.<br>Skrásetingar nr. |

Ongin veruligur eigari ☐

Karl Karlsen, grannskoðari — Fráboðari

09/08/2022 — Dagfesting

Skráseting Føroya · Sigmundargøta 13 · Postboks 264, 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 10 · Teldupostur: skr@vs.fo

Skráseting **Føroya**

Her er tað Sp/f Royndarfelagið við skrásetingar nr. 7777, sum boðar frá at:

1. Big Capital  Denmark A/S eigur 52 % av Sp/f Royndarfelagnum.
2. Persónurin Anders And eigur 50% av Big Capital Denmark A/S. Anders And ræður sostatt yvir 26% av felagskapitalinum í Sp/f Royndarfelagnum og er sostatt veruligur eigari í Sp/f Royndarfelagnum.
3. Persónurin Peder Pedersen eigur eisini 50% av Big Capital Denmark. Peder Pedersen ræður sostatt eisini yvir 26% av felagskapitalinum í Sp/f Royndarfelagnum og er sostatt eisini veruligur eigari í Sp/f Royndarfelagnum.
4. Sp/f Felagið eigur 30% av partapeninginum í Sp/f Royndarfelagnum, og er sostatt løgligur eigari.
5. Persónurin Hans Hansen eigur 90% í Sp/f Felagið. Hans Hansen ræður sostatt yvir 27% av felagskapitalinum í Sp/f Royndarfelagnum og er sostatt eisini veruligur eigari í Sp/f Royndarfelagnum.
6. Persónurin Sára Hansen eigur 18% í Sp/f Royndarfelagnum. Hon er løgligur eigari, tí hon beinleiðis eigur 5% ella meira í Sp/f Royndafelagnum, men hon er ikki veruligur eigari, tí hon ræður ikki yvir meira enn 25% av partapeninginum í Sp/f Royndafelagnum.
7. Karl Karlsen, grannskoðari hevur fráboðað fyri felagið.

Skráseting Føroya 21. september 2022